# Trupult hjá okkum at standa einsamallir

**–Sum gongdin er nú, er tað bara ein spurningur um tíð, áðrenn Kirkjubøar Kommuna er løgd saman við Tórshavnar Kommunu, heldur Annfinn Brekkstein, borgarstjóri**

KOMMUNUMÁL
*Áki Bertholdsen*



*– Enn er samanlegging við Tórshavnar Kommunu ein spurningur, sum vit taka púra róligt, men fyrr ella seinni skal málið takast upp. Fyribils verður mest tosað um samstarv uttan samanlegging*

– Tað verður ómetaliga trupult hjá eini lítlari kommunu sum okkara at standa einsamøll. Tí vænti eg, at tað er bara ein spurningur um tíð, áðrenn Kirkjubøar Kommuna verður løgd saman við Tórshavnar Kommunu.

Annfinn Brekkstein, borgarstjóri í Kirkubøar Kommunu, heldur, at um nøkur ár fer tað at vera sera trupult at vera ein lítil kommuna.

Hann vísir á, at rákið er tann vegin, at fleiri og fleiri málsøki verða flutt frá landinum, yvir á kommunurnar at umsita.

Men hann leggur samstundis afturat, at spurningurin um samanlegging er ikki eitt mál, sum er til viðgerðar í bygdaráðnum í Kirkjubøar Kommunu.

– Viðurskiftini ímillum Kirkjubøar og Tórshavnar kommunu er eitt mál, vit hava tosað leyðsliga um. Men fyribils er spurningurin um samanlegging ikki á skránni.

– Hinvegin ásanna vit, at neyðugt verður við størri samstarvi við Tórshavnar Kommunu, enn vit hava nú.

Hann sigur, at beint fyri jól sendi Kirkjubøar Kommuna tískil Tórshavnar Kommunu skriv við fyrispurningi um økt samstarv. Hann hugsar um t.d. um eldraøki, men eisini um onnur øki, sum framyvir fara at verða løgd út til kommunurnar at umsita.

Enn hevur kommunan ikki fingið formligt svar frá Tórshavnar Kommunu.

– Men munnliga hava vit fingið at vita, at áheitanin er móttikin við vælvild og eg vænti, at vit fáa eina skilagóða samstarvsavtalu við Havnina.

## Sera trupul støða

Annfin Brekkstein sigur, at enn er framtíðin hjá kommununum ikki greið, men útlitini eru til, at munandi fleiri málsøki fara at at vera flutt frá landinum, til kommunurnar at fáa umsita.

– Tað sigur mær so mikið sum tað, at tað verður ómetaliga trupult, fyri ikki at siga heilt ómøguligt, hjá eini fámentari kommunu at standa einsamøll.

– Í øllum førum er tað alneyðugt hjá okkum at samstarva meiri við Tórshavnar Kommuna. Men verða øll tey málsøki løgd út til kommunurnar at umsita, sum talan er um, fer tað at vera ómetaliga dýrt hjá eini kommunu sum okkara Sjálvi fáa vit ikki ráð at byggja stovnar og hava umsiting til øll málsøkini tí, sum verða løgd út til kommunurnar at umsita og tí mugu vit sostatt keypa okkum allar tænasturnar. Og so hongur ikki saman, tí so verður onki eftir til útbyggingar ella til at halda kommununa viðlíka við.

– Tí heldur hann,at hóast tey í Kirkjubøar Kommunu fyribils mest tosa um samstarv við Havnina, er hann sjálvur fullvísur í, at tað er bara ein spurningur um tíð, áðrenn Kirkjubøar Kommuna er ein partur av Tórshavnar kommunu.

Hjann vísir á, at hóast Kirkjubøar Kommuna verður løgd saman við Havnina, fara bygdirnar ikki at hvørva, tó at lítið er at ivast í, at kommunan verður øðrvísi, enn hon nú er.

At Kirkjubøar Kommuna fegin vil hava samstarv ið Tórshavnar Kommuna er ongin ivi um. Herfyri tók Kirkjubøar Kommuna seg úr Føroya kommunufelag og meldaði seg inn í Kommunusamskipan Føroya og tað var júst fyri at vera í sama felag um Havnin er í.

# Hósvíkingar fríggja til Sunda Kommunu

**Bygdaráðið í Hosvík hevur samtykt at spyrja seg fyri hjá Sunda Kommunu um samanlegging, hóast Hvalvíkar Kommuna liggur ímillum tær báðar**

KOMMUNU-SAMANLEGGING
*Áki Bertholdsen*



*Eisini í Hòsvík er spurningurin um kommunusamanlegging nú búnaður so mikið, at fyrispurningurin er sendur Sunda Kommunu um at leggja saman*

– Eg havi ikki verið talsmaður fyri at leggja kommunur saman. Men eg eri komin til ta niðurstøðu, at tað slepst valla undan.

Jógvan Mørkøre, borgarstjóri í Hósvík er ein av teimum, sum hevur broytt støðu til spurningin um kommunusamanlegging so hvørt sum málið er búnað og mýkt seinastu árini.

Og júst spurningurin um samanlegging var til viðgerðar á bygdaráðsfundi í Hósvík í seinastu viku.

Hann sigur, at úrslitið av tí fundinum var, at Bygdaráðið í Hósvík samtykti at seta seg í samband við Sunda Kommunu um at leggja saman.

– Spurningurin um samanlegging hevur verið til umrøðu á bygdaráðsfundir í Hósvík fleiri ferðir, men á fundinum í seinastu viku varð so samtykt at vit skuldu seta okkum í samband við Sunda Kommunu at loddað dýpið.

Jógvan Mørkøre sigur, at ætlanin er at hava ein óformligan fund við Sunda Kommunum at tosa um samanlegging fyri at vita, hvat ber til, og, hvat ikki ber til.

Men bygdaráðsformaðurin leggur dent á, at tað verður fólkið í Hósvík, sum kemur at gera av, antin kommunan skal leggjast saman við aðra kommunu, tí tað verður ongin samanlegging uttan at ein meiriluti er fyri tí á fólkaatkvøðu í Hósvík.

Hann heldur, at tað er neyðugt at taka spurningin upp nú, heldur enn at skumpa hann frammanfyri sær alla tíðina.

– Verður øll tey málsøki løgd út til kommunurnar, sum talan er um, dugi eg at síggja, at tær smáu kommunurnar koma at detta niður ímillum.

Men hann sigur eisini, at tað er eisini ein spurningur um at tryggjað eitt samstarv ímillum kommunurnar.

Kommunurnar har um leiðir, tvs, Hósvíkar-, Haldarsvíkar-, Sunda-, Hvalvíkar og Gjáar Kommuna eru í eini felags kommunu, sum samstarvar um ymisk viðurskifti.

– Men í tí samstarvinum ber ikki til at taka bindandi avgerðir. Felagskommunan kann verða samd um ávís viðurskifti, men so kanntað verða kolldømt í teimum ymisku bygdaráðinum, og tað ger kommunal arbeiðið nakað óliðiligt.

## Norður ella suður

Nú eru Hósvíkar Kommuna og Sunda Kommuna ikki grannar av tí at Hvalvíkar Kommuna er ímillum og tí er tað kanska ikki heilt eftir ætlanini hjá Landsstýrinum at tvær kommunur leggja saman, sum ikki eru ein natúrlig eind.

Men tað heldur Jógvan Mørkøre ikki vera nakar trupulleiki, tí Skála og Runavík hava lagt saman, hóast Gøtu Kommuna er ímillum.

– Eg dugi ikki at síggja nakað endamál í at leggja Hvalvík og Hósvík saman, tí tað verður so lítil munur á fólkatalinum og frá gamlari tíð, verður tað helst verri at fáa fólk at góðtaka at Hósvík og Hvalvík verða lagdar saman, tí í 1955 fóru kommunurnar sundur.

Í Hósvík búgva 266 fólk og í Sunda Kommunu búgva útvið 500 fólk. Í Hvalvíkar Kommunu búgva gott 300 fólk.

Jógvan Mørkøre sigur, at skal Hòsvík leggja saman, eru tveir vegir at fara, antin suðureftir og leggja saman við Tórshavnar Kommunu, ella at fara norðureftir og tá heldur hann, at tað er natúrligari at leita norðureftir, tí samstarv er við Sunda Kommunu sum er ígjøgnum felagskommununa

Tí dugir hann ikki at síggja nógv bein í einum samstarvi ímilum Sunda- og Hósvíkar kommunu, tá ið so neyvt samstarv er frammanundan.

– Vit koma eisini at liggja sum ein endastøð undir øllum umstøðum og tá halda vit at tað er frægari at verða saman við teimum norðaru kommununum, tí tá verða vit á meiri jøvnum føti.

– Eg síggi t.d. fyri mær, at byggja vit ein barnagarð í Hósvík, liggur væl fyri hjá sundafólki at avlera børnini, eitt nú á veg til arbeiðis í Havn.

Hann vísir eisini á, at Sunda Kommuna hevur bygt skúlan út og hann heldur, at skal hvør kommuna byggja sín skúla út er tað oyðsl, heldur enn at samstarva so at tað verður bíligari hjá øllum pørtum, sigur Jógvan Mørkøre.

Men tað, sum hann sær fyri sær, er, at um nøkur ár, er øll felags kommunan løgd saman.




# Dugir tú at tekna?



## Fá arbeiðsroyndir til at søkja inn á reklamuskúla ella grafiskan skúla

Kundi tú hugsað tær at farið á grafiskan designskúla ella reklamuskúla? So bjóðar reklamuhúsið Sansir tær arbeiðsroyndir, áðrenn tú søkir.

Den Grafiske Højskole og Danmarks Designskole mæla til, at tú hevur arbeiðsroyndir, áðrenn tú søkir. Vilt tú hava upplæring hjá Sansum, er tað ein fyrimunur, um tú hevur studentsprógv, HF, HH ella líknandi.

Tú mást duga væl at tekna. Ríkt hugflog og góður sansur fyri litum og formi er eitt krav. Og hevur tú ans fyri tónleiki, ger tað ikki støðuna verri.

Eitt lætt lyndi, góð samstarvsevni og evnini at arbeiða í bólki eru eisini neyðug at hava í viðførinum.
Skriva nøkur orð um teg sjálva/n. Ger eina mappu við tekningum og øðrum grafiskum tilfari, sum tú sjálv/ur hevur gjørt. Og send okkum tað ella kom inn á gólvið við tí. Tú fært tilfarið aftur.

Kunnu vit ikki taka dagar ímillum innkomna tilfarið, fara vit at geva tær eina grafiska uppgávu at loysa, sum vit síðan taka støðu út frá.

Seinasta freist at søkja er týsdagin 14. mai 2002. Tú skalt byrja 5. august 2002.

SANSIR

PF SANSIR • REKLAMUHÚS • POSTBOKS 1099 • TINGHÚSVEGUR 47 • 110 TÓRSHAVN • TEL 355 355 • FAX 355 350 • SANSIR@SANSIR.FO • WWW.SANSIR.FO

Sansir eru eitt virki, ið tekur sær av heildarsamskifti. Hugskotið er berandi styrkin. Vit hjálpa virkjum við samskifti, so tað svarar til samleikan og mentanina hjá einstaka virkinum.

Sansir hava drúgvar royndir í at geva virkjum eina útsjónd. Vit leggja til rættis og greiða lýsingarherferðir. Og vit hjálpa virkjum við kunning, tíðindaskrivum og líknandi.

Sansir brúka eisini internetið sum eitt arbeiðsamboð í samláddu marknaðarføringini.
Á Sansum arbeiða sjey fólk. Vit eru at hitta á www.sansir.fo